Fíggjarmálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 3 november 2020
Mál nr.: 20/00348
Málsviðgjørt: JEK

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Fylgibroyting orsakað av broytingum í almannalóggávuni o.a.)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)
(Fylgibroyting orsakað av broytingum í almannalóggávuni o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 150 frá 27. oktober 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 29, nr. 13 verður litra c orðað soleiðis:
"c) Veitingar eftir §§ 15-19, § 24 og §§ 26-30 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur."

2. Í § 29, nr. 29 verður aftaná "heilsukanningar" sett: ", umframt gjald til vistarhald og klæði til barnið, sbrt. § 1, stk. 2, og lummapeningur til barnið, sbrt. § 1, stk. 3 í kunngerð um samsýning til fosturforeldur".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjalding av veitingum frá og við januar 2020.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Við uppskotinum verður mælt til, at tvær broytingar verða gjørdar i skattalógini.

Fyrra broytingin er ein fylgibroyting orsakað av, at ásetingar í forsorgarlógini eru fluttar yvir í løgtinglóg um almannatrygd og tænastur.

Seinna broytingin er ein lógarfesting av galdandi venju.

1.2. Galdandi lóggáva
Í § 29, nr. 13, litra c í skattalógini er ásett, hvørjar veitingar í forsorgarlógini eru undantiknar skattskyldu. 1. januar 2021 fer forsorgarlógin úr gildi, og er tí tørvur á fylgibroytingum í skattlaógini, soleiðis at skattlógin vísir til tær ásetingar í almannalóggávuni, sum frá 1. januar 2021 skulu vera undantiknar skattskyldu..

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er lutvíst at dagføra skattalógina, soleiðis at skattalógin eisini eftir ársskiftið vísir til røttu ásetingarnar í almannalóggávuni yvir veitingar, sum eru frítiknar fyri skatti, lutvíst at fáa eina formliga heimild fyri at frítøka veitingar eftir § 1, stk. 2 (gjald til vistarhald og klæði til barnið) og § 1, stk. 3 (lummapengar til barnið) í kunngerð um samsýningar til forsturforeldur fyri skatt.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Fyrra broytingin ber í sær, at tær veitingar í forsorgarlógini, sum í dag eru skattafríar, eisini verða skattafríar eftir ársskiftið, hóast heimildin fyri at lata veitingarnar verður flutt úr forsorgarlógini í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Seinna broytingin ber í sær, at tann venja, sum er í dag, ikki at skatta ávís gjøld til barnið eftir kunngerð um samsýning til fosturforeldur, verður lógarfest.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Almannamálaráðnum, Almannaverkinum og TAKS.

Harumframt hevur uppskotið verið til almenna hoyring á heimasíðuni hjá Føroya landsstýri.

Fíggjarmálaráðið hevur tikið innkomnu hoyringarsvarini til eftirtektar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar eru fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur jaligar sosialar og fíggjarligar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar, tí við uppskotinum halda verandi skattafrítøkur, sum antin hava heimild í § 29 í skattalógini ella eru grundaðar á praksis, áfram.

Fyri at ongin ivi skal vera um, at fasta gjaldið til vistarhald og klæði, sbrt § 1, stk. 2, og gjaldið til lummapengar, sbrt § 1, stk. 3 í kunngerð um samsýning til fosturforeldur eru skattafríar veitingar, verður tað lógarásett, at gjøldini eru skattafrí.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið er ikki í ósamsvari við millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki í stríð við tvørgangandi sáttmálarnar, sum eru galdandi fyri Føroyar.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki kendar markaforðingar á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Við uppskotinum sleppa ávísar veitingar til børn eftir almannalóggávuni undan skatti.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1
Við ársskiftið kemur løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur í gildi, samstundis verður forsorgarlógin sett úr gildi.

Fyri at tryggja, at tær veitingar eftir forsorgarlógini, sum í dag eru skattafríar, eisini verða skattafríar eftir ársskiftið, tá heimildarlógin fyri at lata somu veitingar er løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, verða konsekvensbroytingar gjørdar i skattalógini, soleiðis at skattalógini eisini eftir ársskiftið vísir til røttu ásetingarnar í almannalóggávuni.

Til § 1, nr. 2
Kunngerð nr. 69 frá 19. mai 2006 um samsýning til fosturforeldur, sum broytt við kunngerð nr. 159 frá 1. desember 2018, heimilar útgjald av

1) samsýning til fosturforeldur,
2) gjald til vistarhald og klæði til barnið og
3) lummapeningur til barnið.

Samsýning nr. 1) er skattskyldug veiting. Gjald til vistarhald og klæði til barnið (2) og lummapeningur til barnið hava í royndum ikki verið skattað, hóast gjøldini ikki positivt eru undantikin skatti.

Fyri at eingin iva skal vera um, at talan er um skattafríar veitingar, verður verandi venja (praksis) lógarfest.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 3. november 2020

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Almannamálaráðnum